## DAGSINS MEINING

# Ábyrgdarleysi varaløgmaður

At oljan fór at vera so kraftiga misnýtt av Tjóðveldisflokkinum uppundir hetta Fólkatingsvalið mundi neyvan vara nakran. Tað grovasta og mest undirgravandi dømi fyri vunnin føroysk rættindi var lýsingin frá Tjóðveldisflokkinum við stórari mynd av varaløgmanni í Dimmalætting í gjár.

Varaløgmaður sáar alment iva hvørt føroyingar hava rættin til oljuna. Hetta ger varaløgmaður, hóast fremsta serfrøðin og ikki minst allir seriøsir politiskir flokkar eru á einum máli um, at sjálvandi hava føroyingar rættin til oljuinntøkur eins og vit hava rættin til fiskivinnutilfeingi, skattinntøkur í Føroyum o.s.fr. Hvussu við fiskinum á grunnunum - eiga vit hann? Sjálvandi gera vit tað, og hví skuldi oljan verið øðrvísi?

Tjóðveldisflokkurin er við fínum orðum follin aftur í sína destruktivu støðu frá 50'unum, har vit føroyingar einki kunna og einki eiga, uttan loysingin er framd.

Danski løgmálaráðharrin sigur ikki eitt orð um olju í citatinum, sum Høgni Hoydal vendir til, at vit fara at fáa eitt "eljustríð um oljuna". Her er einki at stríðast um, um bara føroyskir politkarir lata vera við at vísa almenna undirbrotligheit og sáa iva, sum kann gagna óseriøsa partin av fjølmiðlunum. Høgni Hoydal gevur Dansk Folkeparti góð kort á hondina, um teir kunnu vísa á, at varaløgmaður í Føroyum ivast í avtaluni frá 1992.

Føroyskir politikarir mugu ikki ganga serfrøðini ímóti og alment sáa iva um eina klokkuklára avtalu. Hví vil varaløgmaður yvirhøvur gera nakra avtalu við donsku stjórnina, um einki ber til allíkavæl uttan fullveldi?

Føroyingar hava eina kolvetnislóggávu, eina kolvetnisskattalóggávu og eina kolvetnisskattumsitingarlóggávu, sum Tjóðveldisflokkurin sjálvur hevur verið við til at lagt fram og samtykt. Hví samtykkir Tjóðveldisflokkurin slíkt, um teir ikki trúgva uppá avtaluna frá 1992? Hví yvirhøvur luttaka í heimastýrispolitikki, um einki er haldbart uttan fullveldi?

Vónandi gevast Tjóðveldismenn at undirgrava vunnin rættindi. So leingi føroyingar standa saman sum ein maður, so kann tað verða líka mikið, hvat danska pressan og Dansk Folkeparti diskutera niðri. Eitt er vist, at lýsingin hjá Tjóðveldisflokkinum í gjár hevur gjørt stóran skaða við at purra uppundir eitt óseriøst orðaskifti um eitt mál, ið sambært allari serfrøðini og seriøsum politiskum flokkum er avgreitt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hví trívist lærarin ikki???

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn, 13. nov. 01*



Í øllum framkomnum londum gera tey eina eftirmeting, tá ein nýggj skipan er roynd á økinum í eina tíð.

**Integrering!**
Um tað mundi, tá Føroya Spesialskúli var komin, t.v.s. fyrst í sekstiárunum, var nógv frammi um integrering. Eisini í Føroyum vóru bylgjurnar høgar viðhvørt, og tað vóru tey, sum ynsktu henda skúlan, (spesialskúlan) har piparið vaks.

**Hvat hevði fólkaskúlin at bjóða, áðrenn spesialskúlin kom?**
Einki! Tað var ikki eftir áheitan frá skúlunum, men frá *fortvivlaðum* foreldrum, sum høvdu sent síni børn av landinum.

Eingin – eg taki uppaftur – eingin kann hugsa sær, hvussu hesi foreldur høvdu kempað og stríðst millum at hava børnini heima við ongari frálæru, og so at lata tey fara av landinum og fáa frálæru.

Væl vitandi nú, so síggi eg, at áhaldandi bøn og úthaldni fekk tey at taka hesa avgerð. Ærað veri teirra minni.

Hjúnini Annilena og Jákup Zachariasen slóðaðu fyri einstaklingar – og ser-undirvísingini í Føroyum.

Vit vóru nøkur, sum valdu at fara undir hetta krevjandi arbeiði.

Tá eg upplivdi hesi 3: Ditlev, Margit og Hjørmund – hvussu stórt arbeiði, og hvussu stóran kærleika, tey løgdu í fráláeringina, so ivaðist eg onga løtu í, hvørjum børnum eg ynskti at undirvísa.

**Skeiðvirksemi**
Vit vóru ofta send niður á skúlar, tí tú mátti endurnýggja teg alla tíðina, tí tað hendir so nógv á hesum øki. Niðri var baklandið størri, og tí var tann vegurin valdur.

**Eftirmetingin!**
Meðan eg var á deyvaskúlanum á Kastelsvegnum, kom út ein bók – eftirmeting viðv. integreringini. (1965).

Longu tá gjørdu tey vart við, at ikki var alt so gott, sum tey høvdu vónað. (Her er talan um øll brek). Ein av orsøkunum var, at lærarar vóru farnir at skifta starv, tí hetta fór at verða ov lítið úrslit í mun til tað arbeiðið, ið lagt varð í.

Her skal leggjast aftrat, at eingin sparing var upp á tal, og nógvir lærarar høvdu fingið ta kravdu frálæruna at taka sær av hesum.

**Eykaútbúgvingin í Føroyum**
Nakrir lærarar høvdu fingið eina eyka útbúgving, men eg veit t.d. at einasti skúli, ið t.d. undirvísti deyvum og blindum, var spesialskúlin, men har komu tey ikki í praktikk. –

Annars hevur fólkaskúlin als ikki fingið fyrireikað seg at taka ímóti næmingum við serligum tørvi.

**Skúlin í Runavík og Klaksvík**
Hesir skúlar høvdu kortini gjørt eitt dygdargott fyrireikingararbeiði – at taka ímóti deyvum. Eg hugsi, at teir skúlastjórarnir hava trýst nógv á og sett treytir og fingið sín vilja.

T.d. sendu hesir báðir skúlar lærarafólk til Havnar – fyrst eitt heilt ár og seinni á stytri skeið og hetta vóru sera dugnalig og virkin fólk, sum valdu sær hetta. Skúlin í Rituvík hevur víst, at tað bar til, og úrslitið kunnu tey vera stolt av. Allur flokkurin (úr 1. flokki og allan vegin upp) lærdi t.d. teknmál, so næmingurin, sum deyvur var, hevði bæði familju og lærarar og floksfelagar, sum hann lættliga kundi samskifta við.

**Orsøk(ir) til mistrivna!**
Ferð eftir ferð havi eg víst á, at »integreringin« hevur gjørt lærarar til syndabukkar. Hví? Jú, henda uppgávan er smoygd niður yvir tey – uppgávan, sum er so stór, men sum endar við, at fleiri lærarar ganga við ringari samvitsku, tí so lítið kom burturúr. Vit eiga nógv fram úr dugnalig lærarafólk, og tað er spell, at tey lítið annað vita sær, enn at skifta starv. Eg eri bangin fyri, at nú vendist ikki við, tí nú er einki stað at senda tey við serligum tørvi. Spesialskúlan hava tey brotið niður. Nokk so vanligt fyribrygdi í Føroyum: Tað, sum virkar væl, skal niðurbrótast.

Samanber við Landssjúkrahúsið o.m.a.

Til lærarafelagið vil eg siga: Haldið fram við tykkara ágrýtni fyri einum góðum fólkaskúla – hann er grundvøllurin í tí føroyska samfelagnum.

Eg ynski tykkum alt tað besta.

Eitt má samfelagið syrgja fyri og tað er, at vit ikki koma í ta støðu, sum vit vóru í, áðrenn 1962, tá børn vórðu send av landinum at fáa frálæru.

Børn hava rætt til góðan SKÚLA í heimlandinum.

# Oggi umborð á sluppuni Høganes

TÍÐINDASKRIV

Forvitnislig listaframsýning umborð á Sluppuni Høganes. Tað er 30 ára gamli listamaðurin Karstin Olgar Lamhauge (Oggi) úr Søldarfirði, sum sýnur fram grafiskar myndir. Talan er um 17 grafiskar myndir og listamaðurin hevur nýtt ymisk grafisk tøkni so sum steinprent, turrnál, linoliumskurður og einprent. Listamaðurin ynskir at skapa eina myndlistarliga heild á sýningini og tó leggja dent á frávikini, sum koma til sjóndar.

Listamaðurin hevur verið við á fleiri várframsýningum og hevur umframt hetta víst síni verk fram saman við øðrum. Um framt hesa aðru almennu stakframsýning hansara, her á landið, hevur hann latið altartalvan úr hondum, til Hattarvíkar Kirkju og hendan var vígd 9. Juli í fjør.

Sýningin verður opin frá týsdegnum 15. mai til hósdagin 17. mai og verður opin um somu tíðir sum fiskivinnustevnan á staðnum.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

## VIÐMERKINGAR

# Rúsdrekkalógin í Føroyum

**Hans Birgir Hansen**

Tað var á heysti 91, eg hevði lesarabræv í Dimmalætting við heitinum »fríari rúsdrekkasøla«. Hugskotið/sjónarmiðið tók Marita Petersen á vári 92 upp í Sosialinum. Tað skal hon hava tøkk fyri og at hon fekk tað lagt fyri løgtingið, ið eftir løgtingsviðgerð samtykti uppskotið, ið bleiv sett í gildi í Føroyum og skapti nógv arbeiði!

Tað skal verða sagt, at rúsdrekkalógin hevur bøtt munandi rúsdrekkavanar/siðir hjá flestu føroyingum, ið við árunum skuldu læra seg at drekka við mátahaldi. Tað varð í lesarabrævinum greitt frá fyrimunum/vansum við at drekka smærri og størri nøgdir av rúsdrekka, skuldi ein sleppa undan at fáa rúsdrekkaskaðar!

Tað førdi við sær, at vit fingu loyvisnevnd, ið hevði skeinkiloyvi um hendi, ið síðani gav hotellum, matstovum og ølklubbum kring landið skeinkiloyvir.

Tað førdi við sær fleiri vitjandi gestir hjá áðurnevndu og vit hava fingið rúsdrekkamentan á sama støði sum í londunum kring okkum í dag!

Tað skal verða heitt á landspolitikarar um at fáa endurskoðað rúsdrekkalógina, fáa nógv strangari eftirlit við teimum, ið selja/skeinkja rúsdrekka! Tað skal verða heitt á tykkum at fáa eftirlitið víðkað til at umfata kaffivognar/kioskir/matvøruhandlar, ið ikki skulu selja øl til tey undir 18 ár!

Tað er neyðugt at taka fyribyrgjandi táttin við rúsdrekka/narkotika upp aftur í fólkaskúlum/hægri skúlum/lærustovnum/arbeiðsplássum!

Tað skal fáast strangari eftirlit við teimum, ið selja/skeinkja rúsdrekka í brúdleypum/ársveitslum/privatum veitslum kring landið!

Tað skal verða heitt á landspolitikarar at fáa endurskoðað Politiviðtøku fyri Tórshavn, ið er eldri enn 100 ára gomul!

# Trettan blásarar



TÍÐINDASKRIV

Trettan blásarar ú Føroya Symfoniorkestri fara í næstum at spæla tvær konsertir.Tann fyrra verður í Christianskirkjuni leygardagin 22 sept. Kl. 17:00 og tann seinna í Norðurlandahúsinum sunnudagin 23. Sept. Kl. 16:00.

Á skránni verður serenada fyri trettan blásarar av Richard Strauss, Notturno opus 48 nr. 1 av Frédéric Chopin og cellokonsert opus 104 av Antonin Dvorak.

Solistur : Kgl. Kapelmusikus Ib Herman

Dirigentur: Martin Mouritsen

Fyrsta verkið á skránni er "Serenade í Es fyri 13 blásarar" av Richard Strauss (1864-1949). Henda serenada er eitt av ungdómsverkum hansara, og hóast Strauss seinni næstan frásegði sær verkið sum verandi einki annað enn eitt virðiligt avrik av einum tónleikastudenti, so varð verkið fyrstu ferð framført av kenda Meininger Hofkapel við táverðani stórsta dirigentinum, Hans von Bulow. Og ivaleyst hevur tað vælljómandi yndi, sum er yvir verkinum, hugtikið bæði Bulow og tónleikararnar. Tónamálið er romantiskt og líkiast lítið seinni verkum hansara. Verkið er vakurt og vælljómandi, og átøkiligur er tann skiftandi lagdámurin og ljómurin úr teim ymsu blásiljóðførunum, træblásarunum og teim fýra waldhornunum.

Frédéric Chopin (1810-1849) er næstur á skránni. Chopin var í 19 øld mettur at vera ein av størstu klaversnillingunum nakrantíð, og flestu av hansara tónaverkum eru eisini fyri klaverið. Umframt klaverkonsertir, so hevur hann skrivað eina ørgrynnu av smærri verkum, so sum polonaisur, masurkair, etuder o.s.v. , sum hann nýtti til egnar framførðslur. Við síni serligu framferð og sermerktu útsjónd, vóru tað ikki minst kvinnur, sum flokkaðust til konsertir hansara í París, og fleiri teirra skuldu fallað í óvit av ovurundran. Og ikki minst vóru tað hansara notturnoir, hesi vøkru og dreymakendu løgini við náttardámi, sum vóru vælumtókt. Ein av hesum notturnoinum, nr. 48, verður framførd á hesi konsertini, ikki fyri klaver, men í eini útseting fyri 13 blásarar av danska tónasetaranum Peter Naur.

Seinast á skránni er konsert fyri cello og orkestur eftir Antonin Dvorak (1841-1904). Dvorak skrivaði bert eina konsert fyri cello og orkestur, opus 104 í h-mol og er hon skrivað í Ameriku veturin 1894-95, um sama mundið, sum hann skrivaði sítt kanska kendasta verk, symfoniina "Úr nýggja heiminum". Sum allur tónleikur Dvoraks, er konsertin sera sangbar, og ber í sær tilfar úr tjekkiskum/bøhmiskum fólkatónleiki. Cellokonsertin er sum vant í trimum satsum, og byrjar við einum orkesturforspæli, kunnandi um høvuðstemaðið og beint eftir kemur tað sanagbara og fólkaliga síðutemaðið. Annar satsurin er ein adagio, og hevur sum tema ein av sangum Dvoraks, meðan seinasti satsurin, sum onkur hevur nevnt tað, strálar av frøði yvir, at hann nú skjótt skal aftur til sítt elskaða føðiland, Tjekkia ella Bøhmen ; Dvorak treivst ongantíð rættuliga í "Nýggja heiminum ".

Hetta er ein forkunnug útgáva av hesi cellokonsertini, tí hon er upprunaliga skrivað fyri vanligt symfoniorkestur, men verður her framførd í eini útseting av danska tónasetaranum Peter Naur. Solistur er danski celloleikarin Ib Herman.

Hetta er ein spennandi og - sum nevnt - forkunnug konsertskrá, har nakrir av okkara fremstu tónleikarum á klassiska veinginum vera teir, sum fara at manna tónleikabólkin. Vónandi vilja fólk geva sær stundir at vitja.

Konsertirnar verða í Christianskirkjuni leygardagin 22 sept. Kl. 17:00 og í Norðurlandahúsinum 23. Sept. Kl. 16:00.





# Væleydnað mótakvøld í Runavík

**Skipað varð fyrr í mánaðinum fyri mótakvøldi í nýggju hølunum hjá Kapproðrarfelagnum NSÍ á Glyvrum**

TÍÐINDASKRIV

Hóskvøldið 8. november høvdu mótahandlarnir í Runavíkar Kommunu eitt væleyðna mótakvøld í Kappróðrarneystinum hjá NSÍ á Glyvrum. 10 handlar luttóku. Hesir vóru Jallur, Jungmann, Hygg Inn, Orkis, Chic, Hjá Sannu, Deild C, Shari, Fotomiðstøð in og Shop-in.

Fyrst vóru handlarnir við barnaklæðum á pallinum við nýggjasta móta til tey smáu, alt frá gerandis klæðum til fínasta jólastás.

Síðani komu tey vaksnu á pallin, eldri og yngri sýndu fram nýggjasta rákið til bæð i kvinnur og menn.

Litirnir í heyst og vetur eru mest náttúrlitir, og nú loyvir mótin okkum eisini at seta ymisk mynstur saman, so sum ternut, stríput og leopard. Bert hugflogið setur mørkini.

Útselt varð til sýningina, og tey 140 fólkini hugnaðu sær óført. Blómuhandilin Orkis hevði pyntað snotiligu hølini hjá Kappróðrarfelagnum við ymiskum plantum og prýðislutum. Borð reitt varð við kaffi/te, croisant v/salat, smákøkum, og karamellum.